# ForoeJet og Strandferðslan leingja samstarvið

**Avtalan, sum tryggjar ferðafólkum ókeypis flutning til Flogvøllin er nú longd fyri restina av 2006**

FERÐING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Síðani nýggja flogfelagið byrjaði flúgving sína, hevur skipanin við flutning til og frá flogvøllinum fingið góða undirtøku. Í tíðindaskrivi sigur FaroeJet, at nærum helmingurin av teimum ferðandi hava gjørt nýtslu av møguleikanum, og tí hevur verið arbeitt við at leingja avtaluna við Strandferðsluna.

Tað arbeiðið er nú komið undir land, og nú verður so boðað frá, at samstarvið er longt fram til árslok.

Avtalan ber í sær, at ferðaseðilin hjá FaroeJet framvegis verður galdandi líka frá bústaðnum, sama hvar í Føroyum ein býr. Hetta um ferðast verður við Strandferðsluni og/ella Bygdaleiðum.

# Innbrot í Jinx

Klokkan 02.30 í nátt fekk løgreglan fráboðan um, at ein maður hevði brotið inn í café Jinx í miðbýnum í Havn. Maðurin var ávirkaður og ætlaði at stjala nakrar fløskur av brennivíni. Løgreglan var skjót á staðnum, og maðurin varð handtikin.

FJ

# Ferðsluóhapp í Árnfjarðartunlinum

Um fimm-tíðina í gjár rendi ein eldri maður á í Árnfjarðartunlinum. Maðurin, sum koyrdi á knallert, breyt óstbeini. Hann var fluttur á sjúkrahús og fekk tríggjar pentur í vinstra bein. Blóðroynd er tikin av føraranum, sum er undir illgruna at hava koyrt ávirkaður.




*Kurvan fyri vitjanirnar á portalinum tóktist seta kósina til himmals, tá festivalgestirnir vildu hava tað seinasta at vita um floglíkindini í Vágum*

# Portalarnir sprongdu metini

**Veðurlíkindini kring Summarfestivalin mundu eiga sín stóra lut í, at tíðindaflutningurin á alnetinum fór langt upp um tað, sum higartil hevur verið at sæð**

TÍÐINDI
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Seinasti vevmátingarlistin hjá Gallup man vera ein dyggilig staðfesting av, at flúgvilíkindini í Vágum mundi vera tað, sum upptók flestu føroyingar um vikuskiftið.

Í øllum førum sló portalurin hjá Føroya Tele so ruddiliga sítt egna met. Portalurin hevur støðugt verið langt ovasta heimasíðan á listanum, tá vikuligu uppgerðirnar hava verið at sæð. Tvær tær seinastu vikurnar hevur sýnda síðutalið enntá sníkt sum upp um milliónina, men tað var lítið av miklum, sæð í mun til seinastu vikuna.

Ikki færri enn 1.328.054 sýndar síður hevði portalurin, og tað eru 22,7% fleiri, enn talið var í ólavsøkuvikuni, sum altso bert var met-vika í eina viku.

## Fleiri mjørka-met

Tað kunnu sjálvandi vera nógvar orsøkir til somikið góða vitjan á portalinum, men verður hugt at øðrum síðum, so er lítið at ivast í, at veðrið og Summarfestivalurin áttu sína heilt stóru orsøk í hesum. Planet.fo er hesa vikuna á øðrum plássi, og við 189.210 sýndum síðum var eisini hon so langt oman fyri tað, sum hevur verið vanligt fyri annars sera væl vitjaðu heimasíðuna.

Og somu ábendingar eru at síggja á nordlysid.fo. Heimasíðan hjá lokala blaðnum í Klaksvík var sera væl vitjað, og við 123.573 sýndum síðum var hon trið best vitjaða síðan í vikuni. Og so kann eisini nevnast, at heimasíðan hjá flogvøllinum so ruddiliga eisini sló síni met. Her vóru tey vitjandi 21.482 í tali, og lítið er at ivast í, at tey nógvu av hesum nýttu funkuna við vevmyndum, soleiðis at tey við egnum eygum kundu síggja, hvørt tað hevði hug at klárna ella ikki á flogvøllinum.

# Tvær nólsoyarferjur um vikuskiftið

**Umframt Rituna, fer Brynhild eisini at sigla til Nólsoyar, tá ovastevna verður um vikuskiftið**

SAMFERÐSLA
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Ritan fær hjálp frá Bryngerð, nú allir stevnugestirnir skulu flytast til og úr Nólsoy*

Brynhild røkir annars siglingina til Mykinesar, men nú roknað verður við nógvum stevnugestum í Nólsoy, verður hon eisini tøk til siglingina um Nólsoyarfjørð.

Í tíðindaskrivi boðar Strandferðslan frá, at Ritan røkir siglingina einsamøll fríggjadagin, men at fleiri túrar eru settir inn aftrat verandi ferðaætlan. Og seinasti túrur verður kl. 3 náttina til leygardag.

Leygardagin siglir Ritan líka frá kl. 6.55 og til kl. 05 morgunin eftir. Aftrat hesum fer Brynhild at sigla eftir tørvi, frá kl. 18 leygarkvøldið og út á morgunin eftir.





**Skeið í reingerð**
*21 – 23 aug., 11 sep. og 18 sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við reingerðarevnum, tólum og amboðum, umhvørvi og ergonomi. Mátingar og royndir verða gjørdar av ymiskum evnum, tilfari og amboðum. Í uppgávum verða útrokningar gjørdar, sum skulu vísa, um tað verkliga besta eisini er tað fíggjarliga besta.
Skeiðsleiðari: Kristianna Rein
Tilmelding innan 7 aug.

**Buffét**
*Skeið 1: 18. – 22. sep.,*
*Skeið 2: 25. – 29. sep.*
5 dagar, Skúlaheimið við Marknagilsvegin
Á skeiðnum verður arbeitt við at tilrættaleggja og at matgera til buffét'ir. Skeiðið er skipað soleiðis, at maturin, ið verður gjørdur á skeiðnum, verður serveraður fyri gestum. Skeiðsluttakarin fær innlit í reinførisviðurskiftir í einum stórkøki og ein varhuga av arbeiðsumhvørvinum í einum stórkøki.
Skeiðsleiðari: Martin Restorff
Tilmelding innan:
Skeið 1: 4 sep.
Skeið 2: 11 sep.

**Steinseting**
*16. – 20. okt.*
Á skeiðnum verður arbeitt við tekningum, góðskuni av arbeiðnum og undirlagið. Arbeitt verður eisini við eini praktiskari steinsetingruppgávu, ið verður eftirmett eftir DS 1136.
Skeiðsleiðari: John Hvass
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad innleiðsla**
*19. – 20. okt.*
Skeiðið er ætlað teimum, ið ikki eru von við at arbeiða við teldu. Á skeiðnum verður arbeitt við mús og knappaborði. Lært verður at starta forritið og at byrja eina nýggja tekning, um brúkaraflatuna, amboðs- og kommandolinjur og at skriva kommandoðir. Arbeitt verður við, at tekna einklar uppgávur.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 2 okt.

**AutoCad grundskeið**
*26. – 27. og 30. – 31. okt.*
Lært verður um funkurnar á 2D støði og tilrætta-legging av tekniuppgávum.
Skeiðsleiðari: Marita Hentze
Tilmelding innan 6. okt.

**Beton armering**
*30. okt. – 3. nov.*
Undirvíst verður í grundleggjandi vitan um eginleikarnar á jarnbetongi, trekk og trýstviðurskiftir, ymisk sløg av armeringum, krøvum til bukkidiametur, betongløgum, støðlongdum og ankring. Arbeitt verður við at tilevna og seta vanliga armering eftir tekning.
Skeiðsleiðari: Heðin Gásadal
Tilmelding innan 16. okt.

**Innleiðsla í sveising**
*6. – 17. nov.*
Skeiðslutakarin arbeiðir við einføldum sveisistøðum við elektrodu, gass-, TIG, MIG/MAG-sveisiháttunum. Endamálið við skeiðnum er at læra á grundleggjandi støði um sveising, sveisiteori, umhvørvi og trygd og nýtslu av tólum og amboðum.
Skeiðsleiðari: Jeffri Olsen
Tilmelding innan 23 okt.

**Make Up skeið**
*Skeiðið er skipað yvir 8 kvøld, mána- týs- miku- og hóskvøld frá kl. 19 til 22 í døgunum 5. til 15 feb.*
Evnini á skeiðnum verða: húðanalysa, andlitsformar, litlæra, dag make-up, kvøld make-up, brúðar make-up og "smokey eyes"
Skeiðsleiðarar: Sunneva Thorsteinsson og Unn Zachariassen
Tilmelding innan 22 jan.

www.skeidsdepilin.fo
tilmelding á heimasíðuni
ella á telefon 318 813